tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Ikki aftur 1946…

Oddagrein

Rætt hevur landsstýrið í, at samráðingartilgongdin hevur verið skelkandi higartil, sum sagt verður í Kunningarritinum, sum landsstýrið handaði á tíðindafundinum í Tinganesi í gjár.

Somuleiðis skal á hesum stað verða tikið undir við, at tað skuldi verið óneyðugt at tilnevnt ein altjóða eygleiðara at fylgja við samráðingunum millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri.

Tað hevði verið stór skomm. Talan skuldi verið um tvey siviliserað lond, sum hava havt søguligt samband í 600 ár. Hóast Føroyar vóru eitt hjáland ein stóran part av hesi tíð, hava vit ikki hildið okkum vera hjáland seinastu mongu árini.

Heldur ikki skuldi verið neyðugt við Dáviði Oddson, íslendska forsætisráðharranum, sum semingsmanni í uppgerðini millum Danmark og Føroyar. Nú verður sagt uppgerðini millum Føroyar og Danmark. Tað skuldi ikki verða ein uppgerð, sum tilgongdin hevur verið, kunnu vit næstan staðfesta, at í dag er talan um eina uppgerð.

Í øllum førum løgdu føroyingar út við at seta upp roknistykki um hervaldið, og hvat Danmark hevði spart við at hava herstøðir í Føroyum og Grønlandi, og danska stjórnin svaraði aftur við at seta tøl á útreiðslur, sum danir hava av føroyingum og føroyskum avtalum, viðurskiftum o. ø.

Men vónandi kann hugtakið »uppgerð« skiftast út við eina samráðingarstøðu, nú luftin vónandi verður reinskað, sum Høgni Hoydal, landsstýrismaður, segði á tíðindafundi í Keypmannahavn í gjár.

Tað er tvingandi neyðugt, um vit ikki skulu enda aftur í somu støðu, sum í 1946, sum Anfinn Kallsberg, løgmaður, nevndi á tíðindafundinum í Tinganesi í gjár. Tað má ikki henda, at føroyingar aftur hesaferð skulu velja millum eitt føroyskt uppskot og eitt danskt uppskot.

Avleiðingin av tí kann gerast, at tjóðskaparspurningurin aftur verður eitt politiskt evni, sum trokar onnur átrokandi samfelagsmál alt ov langt aftur. Henda støða, sum vit hava havt seinastu hálvthundrað árini, hevur darvað eini samfelagsligari menning í Føroyum í so nógv.

At vit komu í hesa støðuna er óheppið, og vit kunnu tí einaferð afturat spyrja, um landsstýrið hevur mýkt støðuna í Føroyum nóg mikið undan samráðingunum.

Neyvan, tá landsstýrið nústani nú í sjálvum sáttmálauppskotinum tekur tann »frælsa felagsskapin«, sum varð umrøddur í Hvítubók, framaftur. Hví hevur hann ikki verið meira umrøddur og viðgjørdur á fundinum millum landsstýrið og andstøðuflokkarnar.

Sosialurin

Pegasus fer at senda á Rás 2

Studio Pegasus í Klaksvík og Rás hava gjørt avtalu um, at klaksvíkingar fara at senda fimm tímar um vikuna á Rás 2

– Vit ætla at gera gott útvarpstilfar, og vit fara at seta høg krøv til bæði innihald og tekniska góðsku, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein teirra, ið fer at gera útvarpstilfar í Klaksvík. Á myndini Sonne Smith, tíðindastjóri og Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2

EYÐUN KLAKSTEIN

Seinasta dagin í apríl fer Studio Pegasus í Klaksvík fyrstu ferð at senda útvarp.

Hetta er avgjørt, eftir at Rás 2 og Studio Pegasus gjørdu eina samstarvsavtalu mánadagin. Hon hevur við sær, at í fyrstu atløgu fara klaksvíkingar at senda fimm timar við útvarpi á Rás 2 hvørja viku.

– Síðani Pegasus fór at virka, hevur tað alla tíðina ligið í kortunum, at vit skuldu fara at senda útvarp eisini. Nú gera vit eina varisliga byrjan saman við Rás 2, sigur Steintór Rasmussen, sum rekur Studio Pegasus.

Pegasus ger sjálvt íløgur í tekniska útgerð, sum fer at gera tað gjørligt at senda beinleiðis úr studionum. Hetta hevur við sær, at Pegasus ikki bindir seg meira til Rás 2 enn við teimum fimm tímunum um vikuna, og tí er samstarv við onnur eisini gjørligt í framtíðini.

Ætla at gera gott útvarpstilfar

Næstu 40 dagarnar fara Steintór Rasmussen og fólkini, sum skulu gera sendingarnar úr Klaksvík, at fyrireika seg væl.

– Vit ætla at gera gott útvarpstilfar, og vit fara at seta høg krøv til bæði innihald og tekniska góðsku. Tí ætla vit at fyrireika okkum væl til 30. apríl, sigur Steintór Rasmussen.

Tað verða fólk úr Klaksvík, sum fara at standa fyri sendingunum, men enn vil Pegasus ikki út við, hvat tilfar talan er um. Vit hava tó skilt, at talan verður um onkra undirhaldssending umframt aðrar sendingar.

– Fólk vænta, at okkurt verður sent úr Klaksvík, nú Rás 2 fer at senda her, og vit hava tikið væl ímóti Rás 2, tá teir hava vent sær til okkum. Vit fegnast eisini um, at teir eru hugaðir í samstarvi, sigur Steintór Rasmussen.

Útbyggja studio

Studio Pegasus, sum skjótt hevur tvey ár á baki, hevur higartil bara virkað sum upptøkustudio. Nógvar av best umtóktu føroysku fløgunum í fjør vórðu upptíknar í studionum.

Men framyvir fer Pegasus eisini at verða útvarpsstudio. Tvey upptøkuhøli eru í Pegasus, og annað av hesum verður framyvir sett av til útvarpssendingar. Hetta studio verður út- og umbygt næstu vikurnar, so tað lýkur øll krøv, sum verða sett til eitt nýmótans útvarpsstudio.

– Vit gera sjálvir hesar íløgur, so vit eru fríttstilliaðir, um onnur eru áhugað í at lata okkum gera útvarpstilfar úr Norðoyggjum, sigur Steintór Rasmussen.

Umframt tøkniliga útbygging, ætlar Pegasus eisini at innrætta høli til eina redaktión, har fyrireiking og annað arbeiði kann fara fram.

– Tað fer helst at merkja sendigarnar, at tær verða gjørdar í Klaksvík, men talan verður ikki um beinleiðis lokaltilfar. Tað skal vera líka stuttligt hjá øllum føroyingum at lurta eftir okkum, sigur Steintór Rasmussen.

Framferðin hjá Nyrup var brutal

Fyrrverandi leiðarin hjá teimum Konservativu, Per Stig Møller, finnist harðliga at framferðini hjá danska forsætisráðharranum undir samráðingunum landsstýrið

– Framferðin hjá Nyrup var brutal og óstortlig, heldur konservativi Per Stig Møller

EYÐUN KLAKSTEIN

Danski forsætisráðharrin skaddi samráðingarnar millum donsku stjórnina og landsstýrið, tá hann kom við sínum ultimativa útspæli fríggjadagin.

Tað heldur fyrrverandi leiðarin í danska Konservativa Fólkaflokkinum, Per Stig Møller, sum framvegis er fólkatingsmaður fyri flokkin.

– Framferðin hjá Nyrup var brutal og óstortlig. Hann mátti havt lært av bankamálinum, at soleiðis ber tað ikki til at fara við føroyingum. Harðarenda útspælið hjá honum fríggjadagin skaddi samráðingarnar, sigur hann við Sosialin.

– Føroyar eiga eina framtíð innan fyri ríkisfelagsskapin, men harða útspælið hjá Nyrup kann geva teimum, sum vilja taka loysing, enn størri undirtøku, heldur Per Stig Møller.

Neyðugt at samráðast

Per Stig Møller vil ikki gera viðmerkingar til innihaldið í útspælinum hjá Nyrup, men hann hevur at framferðini hjá danska forsætisráðharranum.

– Føroyingar komu við einum útspæli, og eg eri púra samdur við løgmanni í, at samráðingar síðani skulu vísa, hvat úrslit partarnir koma til. At Nyrup tekur eina avgjørda støðu, áðrenn samráðingarnar eru byrjaðar, er púra burtur við, heldur Per Stig Møller.

– Nyrup við í fyrsta lagi gjarna vísa seg sum ein sterkan mann, og í øðrum lagi vil hann helst hjálpa føroyska javnaðarflokkinum. Men mín meting er, at hann hevur gjørt støðuna verri, tí tað er einki at siga til, um enn fleiri føroyingar fara at ynskja at sleppa burtur úr ríkisfelagsskapinum við Danmark eftir slíka viðferð.

Vánalig byrjan

Per Stig Møller heldur, at stjórnin hjá Nyrup skal meta føroyingar sum frændur heldur enn fíggindar, og at samráðingar skulu vísa, um framtíðin hjá Føroyum er innanfyri ella uttanfyri ríkisfelagsskapin.

– Hesar loysnir hava ymiskar treytir við sær, men tað er týdningarmikið, at tað verður gjøgnum samráðingar, at partarnir koma til eitt úrslit. Og at partarnir nú stríðast í fjølmiðlunum er prógv um, at samráðingarnar fingu eina sera vánaliga byrjan.

Og sambært Per Stig Møller er tað danski forsætisráðharrin, sum skal lastast fyri støðuna.

Minnini um 1946 ganga aftur

Á tíðindafundi í Tinganesi í gjár segði løgmaður, at danska stjórnin eftir hansara tykki ikki virðir ynski føroyinga um at gerast sjálvstøðugir, og at arbeiðshátturin hjá Poul Nyrup Rasmussen og stjórn hansara vekir óhugnalig minnir frá 1946. Tí útilokar landsstýrið ikki, at teir fara at heita á altjóða samfelagið um at hava eyguni við donsku stjórnini í sambandi við samráðingarnar

SVEINUR TRÓNDARSON

Um nakar føroyingur heldur, at tað er gott vinarlag millum donsku stjórnina og føroyska landsstýrið, so fer hann skeivur. Púra skeivur.

Tí eftir samráðingarnar í Keypmannahavn fríggjadagin í síðstu viku er eftir øllum at døma vorðið ísakalt millum partarnar.

Hetta er ein niðurstøða, sum kann gerast eftir tíðindafundin, sum landsstýrið skipaði fyri í Tinganesi fyrrapartin í gjár.

Góðtaka ikki føroyska uppskotið

Á tíðindafundinum greiddi løgmaður frá tilgongdini undan samráðingunum og tí, sum fyriforst á sjálvum samráðingarfundinum fyrsta.

Samstundis legði hann fram øll skjøl í málium og m. a. legði hann eisini fram nógv umtalaða skjalið, sum danska fíggjarmálaráðið hevur gjørt.

Og løgmaður lat ongan vera í ivi um at hann helt lítið um framferðina hjá stjórnini á fyrsta fundinum.

– Vit høvdu eina greiða avtalu um, at landsstýrið skuldi gera eitt uppskot til ein sáttmála og at vit eisini skuldu gera eitt uppskot um hvussu restin av samráðingunum skuldu ganga fyri seg, men tað gjørdist greitt, alt fyri eitt, at danska stjórnin vildi ikki tosa um okkara samráðingaruppskot. Og tað er fullkomiliga burtur úr vón og viti, sigur løgmaður.

Løgmaður greiðir frá, at tá føroyingar løgdu fram uppskotið um »Guidelines«, sum sigur hvussu farast skal fram í samráðingunum frameftir, tá vrakaði stjórnin alt.

– Nyrup feiðaði alt av borðinum, sum stóð í okkara uppskotið til »Guidelines« og tað er av tí heilt einfoldu orsøk, at teir vilja ikki tosað um føroyska uppskotið, sigur løgmaður.

Tað spøkir

Ístaðin vildi stjórnin fyri alt í verðini hava samráðingarnar at ganga út frá einum uppskotið sum minnir nógv um andstøðu uppskotið í Føroyum.

– Hetta kundu vit als ikki góðtaka tí tað var ein greið avtala frammanundan, at tað var uppskot landsstýrisins sum var til viðgerar, sigur løgmaður.

Eitt annað, sum løgmaður hevur fest seg við er, at danski forsætisráðharrin alla tíðina vil hava fólkatingið við í samráðingarnar.

– Hví vil hann tað, spyr løgmaður og svarar sjálvur.

– Eg eri stórliga bangin fyri, at hann vil hava málið í fólkatingið, sum so niðurbindur stjórnina til bert at góðtaka trý til fýra ára skiftistíð og kanska til at koma við einum øðrum uppskotið sum teir eisini vilja hava til fólkaatkvøðu í Føroyum. Tað vekir óhugnalig minnir í mær, sigur Anfinn Kallsberg.

Hann leggur við øðrum orðum upp til, at danska stjórnin tilvitað, hevur latið upplýsingar leka til donsku fjølmiðlarnar fyri at undirgrava samráðingarnar áðrenn tær byrjaðu, og eisini fyri at fáa donsku andstøðuna í sín part. Og hetta seinna eydnaðist í hvussu er í fyrsta umfarið, tí bæði Anders Fogh Rasmussen, úr Vinstra og Bedt Bendtsen úr Konservativa flokkinum hava bakka upp um Nyrup.

– Tølini, sum danska stjórnin leggur fyri dagin, eru fullkomiliga burtur úr vón og viti. Haraftur er útrokningin av føroyingum í Danmark forkastilig og eigur ikki at koma fyri nakrastaðni. Tað einasta stjórnin vinnur við hesum er, at øsa fólk, og tað verður so gjørt við skeivum upplýsingum, sigur løgmaður.

Altjóða eygleiðarar

Sambært løgmanni hevur samráðingartilgongdin higartil verið sera skelkandi og tí avvísir hann ikki møguleikanum fyri, at fáa altjóða samfelagið at hava eyguni við framferðini hjá donsku stjórnini.

Í kunningarritið til fjølmiðlarnar sigur løgmaður:

– Í øðrum pørtum av heiminum er vanligt at heita á altjóða samfelagið um at hava eyguni við tilgongdini um útlendska ríkisvaldið leggur seg ov hart útí tilgongdina.

– Vónandi verður ikki neyðugt hjá okkum føroyingum at heita á altjóða samfelagið um at hava eygleiðara við á teim samráðingarfundum, ið fara at koma.

Spurdur, svarar løgmaður, at hann vónar ikki at tað verður neyðugt og tí kunnu vit gita okkum, at løgmaður ætlar sær at brúka henda møguleika um tað verður neyðugt.

Í hesum sambandi er vert at nevna, at íslendski forsætisráðharrin David Oddsson hevur boðið sær til at verða millumgongumaður í samráðingunum millum Danmark og Føroyar.

Løgmaður var spurdur um hetta var eitt hugskot og svarið hann gav bar á tað borið, at uppskotið var ikki av leið.

– Hann kennir íslendsku søguna, segði løgmaður stutt.

Lesið meira á síðu 9

– Danska stjórnin hevur borið sera ófantaliga at í hesum máli. Teir hava við vilja latið skeivar upplýsingar leka til donsku fjølmiðlarnar. Teir hava fingið andstøðuflokkarnar at taka undir við sínum ætlanum við at seta føroyingum harðar treytir, og tí eri eg sera spentur upp á hvat fer at henda tann 6. apríl, sigur Anfinn Kalsberg og leggur afturat, at tað vekir óhugnalig minnir um 1946, sum stjórnin ber seg at

LANDSFUNDUR SAMBANDSFLOKSINS 2000

verður á Hotel Øravík fríggjadagin 24.- og leygardagin 25. mars

Byrjað verður fríggjakvøldið kl. 20.30 (ella tá Smyril er komin). Skrá sambært viðtøkunum.

Leygardagin verður hildið fram við hesi skrá:

Kl. 10.00 leggur formaður landsfelagsins upp til politiskt orðaskifti
Kl. 12.00 verður døgurðasteðgur
Kl. 13.00 heldur orðaskiftið fram

Gestarøðari frá Vinstra verður við á fundinum. (Nærri verður lýst um hetta seinni).

Leygarkvøldið kl. 19.30 verður veitsla, har øll Sambandsfólk eru vælkomin.

Tekning til veitsluna og til gisting á tel. 318870 ella fax 318910.
Teldupostur: samband@post.olivant.fo Seinasta freist at tekna seg til veitsluna er hósdagin 23. mars. Kostnaður fyri veitsluna kr. 120,-

Øll sambandsfólk eru vælkomin **LANDSNEVNDIN**